Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Kostnaður fyri projektering, ráðgeving og eftirlit við H-bygninginum síðani byrjanina av verkætlanini

Spurningar:

1. Hvat hevur projekteringin kostað tilsamans og býtt yvir ár?
2. Hvat hava ráðgevandi verkfrøðingar kostað, sum eru keyptir inn til verkætlanina?
3. Hvat hevur kostnaðurin fyri eftirlitið við byggingini verið í allari byggitíðini?

Viðmerkingar:

Í flestøllum verkætlanum er væl úr hondum greidd projektering, ráðgeving og eftirlit avgerandi fyri, hvørt ein verkætlan eydnast væl ella ikki.

Nøkur sólskinssøga hevur H-bygningurin hjá Heilsuverkinum ikki verið, og undirritaði hevur í fleiri umførum spurt um viðurskiftini í sambandi við byggingina, sum er eitt álvarsamt dømi upp á eina verkætlan, sum er farin av sporinum á mangan hátt.

Undirritaði setti fyri nøkrum døgum síðani spurning um hetta sama málið (52-029/2025). Í framhaldi av hesum verður spurningurin viðvíkjandi samlaða kostnaðinum av projektering, ráðgeving og eftirliti við hesum arbeiðinum settur.

Á Løgtingi, 15. oktober 2025

Johan Dahl